gult20 cyan20 magenta20 svart20



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til býlingshúsið undir Brúnni.

**Starvið**
Talan er um eitt pedagogstarv, 35 tímar um vikuna, í barnagarsstovu við børnum í aldrinum 3-7 ár.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett tann 15. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hervør Dam, leiðara, tlf. 31 91 80, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9 B, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 16. juli 2001.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Um upptøku av leysum djórum á almennari jørð í Tórshavnar kommunu.

Ikki er loyvt at hava hund, ross, seyð, gás, dunnu, hønu ella onnur djór gangandi leys á almennari jørð, t.e. á gøtu, vegi, breyt ella øki o.t., sum opin eru fyri vanligari ferðslu í Tórshavnar kommunu.

Leystgangandi djór verður upptikið á somu økjum.

Upptikið djór verður flýggjað ánara yrkadagar á Politistøðini antin kl. 9 á morgni ella kl. 5 seinnapart sambært avtalu, tá rindað er fyri upptøkugjald.

Politiið í Tórshavn
Tórshavnar býráð

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðulspedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir 3 stuðlum og fastum sjúkra- og feriuavloysarum til Stuðulsfólkaskipanina.

**Starvið**
Søkt verður eftir stuðulspedagogum til 3 skúlabørn í Bridgehúsinum í Havn.

Bridgehúsið er **eitt tiltak fyri ung menningartarnað í Havn**. Børnini eru 8, 14 og 16 ára gomul.

**Talan er um at skapa frítíðarkarmar til ein barna- og ungdómsbólk, har arbeitt verður tætt saman við øðrum stuðlum.**

**Eisini verður søkt eftir sjúkra-/feriuavloysara til Bridgehúsið.**

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at umsøkjararnir hava hugsjónir um viðkomandi avbjóðingar til júst hendan bólkin.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Sum liður í arbeiðnum verður skipað fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

Arbeiðstíðin er millum 20 og 30 tímar um vikuna, seinnapartin.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í stuðulsfólkaskipanini, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 13. juli 2001. Viðmerk á umsóknina "Stuðulspedagogar".

SNARSKIVAN

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Laboratoriið á Landssjúkra-húsinum

Í tíðarskeiðinum 2. juli til 17. august 2001 verður laboratoriið opið

**mána- til fríggjadag kl. 08.00-09.30.**

## Lærlingur til Seytjan!

Hevur tú áræði og hug til at gerast lærlingur í okkara fyritøku?

- hevur tú hug at arbeiða við móta og litum?
- ert tú røkin og fryntligur?
- ikki bangin fyri at taka tøk?
- umsøkjarin má hava FHS ella HH.

Um hettar hevur tín áhuga, send so okkum eina skrivliga umsókn innan 1. juli 2001.

**Sp/f Seytjan**
Boks 127
110 Tórshavn

SMS søkir eftir

## húsi í Tórshavn til leigu

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434

## Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Eiðis Arbeiðsmannafelag, verður í matarhøllini á Norðis, 14.07. kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

gult21 cyan21 magenta21 svart21



## Tvøroyrar Kommuna

Við hesum verður starv sum verkfrøðingur lýst leyst at søkja.

**Høvuðsverkevni:**
- Leiðsla á Teknisku Deild.
- Projekteringsarbeiði og eftirlit.
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrá-setingararbeiði.
- Býar- og byggiplanlegging.
- Málsviðger og ráleggingararbeiði.
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði.
- Luttøku í dagligum umsitingarligum upp-gávum v.m.

**Førleikakrøv:**
- Verkfrøðingur ella onnur viðkomandi. útbúgving.
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.
- Førleiki í projekteringsarbeiði og byggilist.
- Munnligan og skrivligan málførleika (eisini í enskum).
- Hollan teldufórleika.
- Opin og fyrikomandi.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til býráðsskrivstovuna á telefon 371085.

Starvið verður at seta sum skjótast.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 01.08.2001.

## Varafyristøðufólk til Sambýlini Á Mýrini 4 og 6

Av tí at varafyristøðufólk okkara fer í annað leiðarastarv, er innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, eitt tænastumannastarv sum varafyristøðufólk leyst at søkja til setan 1. august 2001 ella eftir avtalu. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Mýran 4 og 6 eru heim hjá 10 menningartarnaðum fólkum, sum krevja hjálp og vegleiðing í tí dagliga.

Uppgávan hjá varafyristøðufólkinum er at stuðla fyristøðufólkinum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka hansara uppgávur, tá hesin ikki er til staðar. Væntað verður av varafyristøðufólkinum, at tað hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiði í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt. Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf. 311478 ella 211478. Umsóknarfreistin er 23. juli 2001.

Umsóknir skulu sendast til:

**Sambýlini Á Mýrini**
Att: Fyristøðufólkið
Á Mýrini 4-6
FO-188 Hoyvík

Sansir søkir samskipara/ráðgeva

## Kanst tú fáa brikkarnar upp á pláss?



Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvørp og bløð. Faroe Island Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt tilboð skal heintast upp á ein faldara. Eitt útkast skal gerast, myndir skulu takast og finnast, og týska umsetingin skal fáast til vega. Tað eru nógvir brikkar, sum skulu upp á pláss, og sum skulu samskipast.

Umframt arbeiði sum samskipari, skalt tú eisini verða før/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vøra best verður marknaðarførd. Tú dugir væl at skriva føroyskt, og tú dugir væl at samskifta á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan hetta øki.

Tú kemur at arbeiða á einum reklamuvirki, sum tekur sær av samskiftis-uppgávum fyri fleiri kendar fyritøkur og stovnar, so sum: Atlantic Airways, Tryggingarfelagið Føroyar, Kaupthing Føroyar, Kall, Poul Hansen, PRG, Vestsalmon, Føroya Kolvetni, Als, Vágatunnilin og fleiri onnur. Hugskotið er okkara styrki. Vit gera kampanjur, ið fevna um: lýsingar til bløð, sjónvarp og útvarp, internet, faldarar og onnur tiltøk. Sansir hevur júst nú eisini styrkt um sín internetførleika.

Ljóðar hetta, sum eitt starv fyri teg, so send umsóknina saman við tilhoyrandi tilfari til okkara. Vilt tú hava meira at vita um starvið, so ring til Høgna ella Hansinu á telefon 355 355.

Vit fara at bjóða tær vælkomnan í okkara spildurnýggju hús við Tinghúsvegin, sum vit flyta inn í 3. september, tá vit eisini rokna við, at tú byrjar.

Seinasta freist at søkja starvið er 15. august.

Umsóknin skal sendast til: Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, www.sansir.fo, sansir@sansir.fo

SANSIR



## Mála og pussa

Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í einari arbeisðgongd. Skalsem puss og máling. Eisini havi eg Skalflex máling á goymslu.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Arni Samuelsen**
Tlf. 455775
Klaksvík

Vit søkja eftir

## feriuavloysara

at byrja skjótast gjørligt. Hevur tú staðið í handli fyrr og dámar tær væl hetta samskifti við fólk, set teg í samband við okkum.

siri
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316610 Fax 316610

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo